# Landssjúkrahúsið tvífalt hátíðarhald



Í dag hin fyrsta oktober ár 2004 kann Landssjúkrahúsið hátíðarhalda tvinnar merkisdagar.

Liðin eru 35 ár síðani Statshospitalið/psykiatriska deild var sett á stovn, og samstundis verður tann nýggi, stásiligi sjúkrahúsbygningurin G alment tikin í nýtslu.

Ein psykiatrisk deild hevði leingið verið í umbúna sum ein neyðug sjálvfylgja, al tann tíð uml. fjóðri hvør av okkum íbúgvum skuldi átt slíkan dugna á í lívinum. Mann hevði leingi hjálpst sum frægast og við at senda tey ringast sjúku av landinum og tíanverri mangan fyri vell, men seinast í sekstiárunum læt so danska innanríkisráðíð byggja eitt eftir tátíðarmeti stásiligt og fulldygt sjúkrahús til sinnisveikar føroyingar í Føroyum, har tað eisini gjørdist møguligt at bjóða útlagnum føroyskum sálarsjúklingum heimaftur at fáa viðgerð og røkt á minst líka frægum støði sum aðrastaðni.

Har var sanniliga brotið burturúr nýggjum, og væl hevur hilnast bæði so og so. Støðið var høgt bæði tímiliga og fakligt, og hóast almenningurin leingi tóktist firnast at hava fingið sálarsjúkar landsmenn millum sín í gerandislívinum, so er hugburðurin umsíðir broyttur nógv betra vegin, og longu í 1976 var Statshospitalið latið føroyska sjúkrahúsverkinum sum ein psykiatrisk deild javnbjóðis øllum øðrum sjúkrahúsdeplum og við sjálvsagdum tænastuveitingum tvørtur um øll onnur deildarmørk.

Og sum so hevur nú psykiatriski depilin virkað sum ein náttúrligur liður í tí samlaða føroyska sjúkrahúsverkinum og verið virdur sum slíkur.

Psykiatriski depilin er støðugt broyttur og mentur, so sum tíðin hevur kravt tað.

Eitt skifti var seingjatalið oman fyri hundrað og árliga brúkið av seingjadøgum omanfyri 30.000, hagtalsliga svarandi til at knappliga hvør føroyingur kundi verið innlagdur ein dag árliga, men síðani hevur rákið verið at avgreiða sum mest ambulant og annars stytta um innlegg-ingartíðina, so at tað nú bert eru uml. 65 seingjapláss.

Samstundis er onkur seingjardeild gjørd um til dagdeild, onnur til 5-dagadeild, eins og tað eru fingin sambýli úti um landið at útskriva sjúklingar til, sum annars høvdu verið verandi óneyðuga leingið á sjúkrahúsinum.

Eitt skifti var eisini økispsykiatrisk tænasta úti um landið, sum tó varð støðgað av fíggjarávum og fakligum manningartroti, men nú er so ætlanin at royna henda dugna av nýggjum sum lið í eini veruligari sosialpsykiatri.

Hóast tað hevur tikið tíð at venja fólk við psykiatriska depilin, og at føroyingar sjálvir taka ábyrgd fyri sínum sálarsjúku meðborgarum, og tað kanska eisini stundum hevur skortað upp á politiskt og umsitingarligt forstáilsi fyri m.a. fíggjarligum játtanum, so hava starvsfólk yvirhøvur sýnt eitt ótrúligt seiggi og trúfesti fyri søkini.



*Nækrir av upprunapionerunum frá 1969: Frá vinstru: Jóhanna Krosstein,enn virkandi sj.systir, Edna Midjord ,táverandi læknaskrivari, Anna Debes,sj.systir,deyð, Petry,enn virkandi deildarsj.systir, Tordis av Skarði, skrivari hjá Árna, nú pens.,sjálvur Árni Olsen ,yvirlækni, nú deyður, Margret Niclasen, fyrrv.deildarsj.systir, nú pens.,Signhild Johannesen, fyrrv.yvirsj.systir,nú pens. og Marin Samuelsen, enn virkandi deildarsj.systir. (Myndin er frá uml.1990, tá Árni Olsen gavst vegna aldur, 7o ára gamal)*

Psykiatriska deild er tiltikið gott arbeiðspláss, har mong hava starvast óslitið øll síni arbeiðsár, og onnur eru komin aftur aftaná at hava nomið sær framhaldsútbúgving, og hóast liðin eru 35 ár og harvið dastið av einum starvsaldri, virka enn nøkur av teimum undangongufólkum, sum byrjaðu hin minniliga 1. okt. 1969.

Deildin hevur seinru árini megnað væl at profilera seg úteftir yvirfyri fólki, og eitt nú hava yngri starvsfólk fingi í lag psykiatri-undirvísing fyri brúkarar, sjúklingar sovæl sum avvarðandi, og tað er fingin betri samróður við áhugafelagið Sinnisbata viðv. upplýsing og í aðrar mátar søk teirra sinnisveiku.

Sjálvur untist tað mær at virka millum hetta væla lið í yvir 30 ár, og eg kann siga tað einaferð afturat, at av øllum framstigum hesi mongu ár so meti eg kortini tað týdningarmesta vera hugburðsbroytingin manna millum rætta vegin, har fólk eru vorðin tilvitandi um, at sálarsjúkur ikki longur er nakað ófrættakent fremmant, sum bert rakar onnur,grannan og hini, men ein partur av lívsins veruleika, sum vit í samhaldsfesti øll vara av.

Samanumtikið ivist eg ikki í, at psykiatriski depilin eigur framtíðina fyri sær, síðani har eru so mong eldhugað starvsfólk í góðum árum, og tað serliga er millum tey yngru starvsfólkini, at framtøkini spíra og verða framd í verki.

Tillukku øll somul, starvsfólk sovæl sum brúkarar, takk fyri gott samstarv øll tey mongu ár og góðan byrð frameftir.

Og nú júst 35 ár seinri kann so Landssjúkrahúsið hátíðarhalda sína fyrstu stóru nýbygging síðan, og samstundis sum sjúkrahúsið fyrr í ár rundaði tey 80 árini.

At nýggi, stásiligi G-bygningurin kom í tøkum tíma er lítið at ivast í.

Gomlu sjúkrahúshølini hava leingi verið púra niðurslitin av nógvum virksemi, tøknin somuleiðis. Tað er undrunarvert, so trúgv og tolin starvsfólk hava verið hesi alt ov mongu ár, meðan bíðað hevur verið eftir betri umstøðum fyri sovæl brúkara sum starvsfólk ,og eg vænti at hesar so nógv framkomnu umstøður fara at lyfta alt virksemi upp á eitt hægri støði og bøta mundi um trivnaðin.

Sjálvur minnist eg væl afturá, tá eg sjálvur eitt skifti varð fluttur frá gomlu, slitnu psykiatrisku deild á Ríkissjúkrahúsinum yvir á neurologisku deildirnar í tí tá nýgjørda sentralkompleksinum at arbeiða. Tað gjørdist eitt heilt annað flog yvir arbeiðinum og sínamillumtrivnaðinum. Og nakað tað somu kensluna kendi eg ,tá eg fyrstu ferð kom inn á okkara nýbygda psykiatriska sjúkrahús í 1970. Har var alt so snøgt , reint og frískligt, og eg kendi tað so týðiliga hava positivt árin á virkisfýsni starvsfólkana og trivna brúkaranna við.

Hjartaliga tillukku hini gomlu,trúgvu og tolnu- tit hava virkuliga fortjent tað.

Heilsan

**Ey Jo, gamlipsyk.**



*Á morgumfundi við kaffi og bollum afturvið seinast í farnu øld. Frá vinstru: Maria Vang, hjalparlækni, Vilgerð Astridardóttir, táverandi yvirsj.systir, nú deyð, Heri Berg, táverandi leiðndi yvirlækni, nú deyður, Edna Midjord, táverandi leiðsluskrivari, Eyðun Joensen,psykologur, nú penssioneraður og Sofus Joensen, núverandi leiðandi yvirlækni.*



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3853
**Navn: Sp/f Masuka**
**Adressa: 620 Runavík**

**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 09.09.2004
**Viðtøkudato:** 09.09.2004
**Kapitalur:** Kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 90.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Maritha Jóhansdóttir Danielsen, 490 Strendur, Karhild Johansen, Æðuvíkarvegur 16, 645 Æðuvík og Sunneva Petersen, Leitisvegur 73, 600 Saltangará.
**Stjórn:** Maritha Jóhansdóttir Danielsen, 490 Strendur
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðarastovan v/ Eyðbjørg Thorleivsson & Páll Højgaard, 460 Skála
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 09.09.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, matstovuvirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 29. september 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3594,
**Sp/f Royndin Fríða, 530 Fuglafjørður.**

**Viðtøkur broyttar:** 07.09.2004.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 370.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 100.000,00 til kurs 400
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Edva Jacobsen, 530 Fuglafjørður (formaður), Óli Marner Christiansen, Traðargøta 10, 700 Klaksvík og Elibert Jacobsen, 530 Fuglafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum, nevndarformanninum, ella allari nevndini í felag.

Skráseting Føroya tann 24. september 2004

Kristin Balle

---

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Human Resource Management Ráðstevna 21. og 22. oktober á Hotel Føroyum

Lær teg at stýra og stimbra

Lykilin til framburð hjá eini fyritøku liggur hjá starvsfólkunum. Nútíðin krevur, at leiðslan hevur amboð, sum gera hana føra fyri at stýra og stimbra síni starvsfólk, teirra førleika og vitan. Málið er, at øll í fyritøkuni virka til frama fyri felags málum. Tað er millum annað hetta, sum Human Resource Management snýr seg um.

Seminarið vendir sær serliga til stjórar, leiðarar og starvsfólk, ið dagliga fáast við starvsfólkaleiðslu. Endamálið er at geva luttakarunum innlit í nøkur av týdningarmestu evnunum innan fyri hetta økið, og serligur dentur verður lagdur á sambandið við handilsstrategi hjá fyritøkuni.

Við at luttaka fært tú svarað einari røð av spurningum: Hvussu verður HRM-politikkur samskipaður við handilsstrategi? Hvussu tryggjar eitt virki sær tey røttu fólkini? Hvussu skapar fyritøkan eina góða menningar- og útbúgvingarætlan fyri starvsfólk? Er tað altíð fyritøkan, ið skal gjalda? Hvussu rationaliserar tú skilabest.

Dagarnir eru skipaðir við kjakuppleggum, kjaki, fyrilestrum, arbeiði við dømum og umbýti av vitan millum luttakararnar. Seminarið er skipað sum ein vistarskúli og tekur tveir dagar. Kostnaðurin er 5.950 krónur við øllum – t.v.s. undirvísing, tilfari, mati og gisting.

Fyri undirvísingini standa:
**Henrik B. Sørensen,** cand. merc og ph.d. í organisatión á Århus Universiteti, lektor á deildini fyri virkisleiðslu.
**Steinbjørn Hardlei**, Ba.Oecon í virkisbúskapi á Århus Universiteti, við altjóða serútbúgving í broytingarleiðslu á Professional Development Institute í Belgia.

Freistin at boða frá luttøku er mikudagin 6. oktober. Tilmelding fer fram hjá Steinbjørn Hardlei, stjóra í spf. Hugin, á telefon 225 331, teldupost shardlei@hugin.fo ella á heimasíðuni hugin.fo

hugin

Spf. Hugin, ráðgevingarfyritøka, Heiðatún 3, FO-160 Argir, www.hugin.fo

www.sansir.fo

# Stuðulskonsert í Læraraskúlahøllini

Leygarkvøldið verður ein stuðulskonsert til frama fyri Ísrael. Konsertin verður hildin í Læraraskúlahøllini, leygarkvøldið 9. oktober kl 20.00. Havnarkórið og onnur syngja.

Atgongumerki kosta 200 kr, og allur peningurin fer óskerdur til mat og klæði til fátæk á gøtunum og hjálp til barnafamiljur, ið hava mist forsyrgjara.

Fyrireikararnir siga, at orsakað av ófriði, ótryggleika og yvirgangsatsóknum, er støðan í Ìsrael sera vánalig. Mong ósek hava latið lív og onnur eru skadd fyri lívið. Tað er fyri hesi fólk, at farið nú verður undir eina innsavning.

Fyrireikararnir leggja dent á, at mannamunur ikki verður gjørdur, tá ið latið verður, og teir vóna, at føroyingar fara at taka væl undir við hesi innsavnan.

**–eys–**

# Nýggja passið

Fríggjadagin 1. oktober gevst fútaskrivstovan at gera pass. Tá kemur nevniliga nýggja hátøkniliga trygdarpassið í gildi, og útgerðin til hetta passið sigst at vera so kostnaðarmikil, at tað ikki loysir seg at fáa hana heim til Føroyar. Øll pass eftir verða tískil gjørd í Danmark eftir 1. oktober.

Tey, ið skulu av landinum, mugu sostatt minnast til at kanna passið í góðari tíð. Fútaskrivstovan roknar nevniliga við umleið tveimum til trimum vikum í avgreiðslutíð.

Tey eru fleiri, ið millum ár og dag hava fingið nýtt pass útskrivað í skundi, beint áðrenn farið varð av landinum, men hetta fer framyvir ikki at bera til longur.

Tey, ið hava eitt galdandi pass, nýtast tó ikki at loypa á leistum, tí einki krav verður sett til umbýtan av passinum. Einasta fólk mugu minnast til, er at biðja um nýtt pass í góðari tíð.

Frá 1. oktober at rokna, verður eisini neyðugt hjá foreldrum, at fáa nýggj pass til børnini undir 15 ár. Higartil hevur borið til at hava tey standandi í passinum hjá foreldrunum, men tann reglan er nú broytt.

**–eys–**

W W W . S O S I A L U R I N . F O

SOSIALURIN HEVUR FINGIÐ NÝGGJ NUMMUR
tel 34 18 00
fax 34 18 01
GOMLU NUMRINI RIGGA IKKI LONGUR
Sosialurin
teldupostur: post@sosialurin.fo
heimasíða: www.sosialurin.fo
Sosialurin 341800